**Viðvíkjandi broytingum í kapitul 3 í lóg um almenna heilsutrygd frá ársbyrjan 2016**

Eftir broyting í lóg um almenna heilsutrygd frá 24. desember 2015 av Ll 178/2009, eru broytingar gjørdar í tilskotinum til ávísar sjúklingar í sambandi við keyp av útgerð til heilivág, kostískoyti o.a.

Ongar broytingar eru í tilskotinum frá Heilsutrygd til heilivág.

Føðslubót (ernæringspræparater) fær stuðul, um tað er fyriskipað av lækna, og er á listanum yvir tilskotsheimilaða føðslubót. Sí 'leinkja til føðslubót sum fær tilskot' á heimasíðuni hjá Apoteksverkinum.

Diabetikarar og fólk við álvarsamari, kroniskari sjúku fáa tilskot til bæði heilivág og hjálparráð, sum neyðug eru fyri eina nøktandi medisinska viðgerð av sjúkuni, um sjúkan er staðfest av lækna og skrásett í Apoteksskipanini. Dømi um álvarsamar og kroniskar sjúkur: cystisk fibrosa, cerebral paresa og Sucla2 mutatión.

Møguleiki er hjá lækna at søkja um einstaklingatilskot til útgerð, sum nýtt verður í samband við heilivágsviðgerð, eftir somu skipan sum einstaklingatilskot til heilivág.

Ávísing til útgerð til heilivág, kostískoyti o.a. kann læknin í hesum førum skriva á forskrift í THS, hóast talan ikki er um heilivág. Til ber at skriva hvussu leingi ávísingin skal verða galdandi (tó í mesta lagi 2 ár), nøgd og millumbil millum útflýggingarnar.